

Hilmar Simonsen

# Hanus Vang – hvørjum bíða tit eftir?

Hanus Vang hálovar nú um dagarnar einari bók, skrivað av eini sambiskari kvinnu, sum er umsett til føroyskt av loysingarstríðsmanninum Zakariasi Wang, og rættlisin av einum ikki minni loysingar-stríðshugaðum manni, Svein Ísheim nevndur.

Funni fressurin í bókini hjá hesum stríðsmonnum er, at afrikansk lond klára seg av hundanum til, hóast tey hava fingið menningarhjálp í nógv áratíggju. Og í røttum Erasmus Montanus stíli merkir støðan í Afrika fyri teir, at ríkisstuðulin úr Danmark til Føroya ger okkum fátæk. Erasmus Montanus kundi jú í síni tíð prógva, at mamma hansara var ein steinur. Tí ein steinur dugdi ikki at flúgva, og tað dugdi mamman heldur ikki, altso var mamman ein steinur. Hanus Vang gevur ríkis-stuðlinum og ríkisfelags-skapinum skyldina fyri, at "vit hava hægsta skattatrýst á láglønt; bestu treytir hjá politikarum; pengarnir røkka ikki til hjá vanliga fólkinum; hava stættarsamfelag; og onki fólkaræði".

Eg rokni so avgjørt við, at bæði Vang, Wang og Ísheim eru sannførdir í síni trúgv, og at tað nyttar lítið at royna at sannføra teir um nakað annað. So tann partin fari eg at lata liggja í hesum umfari. Hinvegin fari eg at koma við einum uppskoti um, hvussu teir kunnu sleppa burtur úr hesi ótolandi støðuni, teir eru havnaðir í.

### Ríkisborgararættur og skattur

Í fyrsta lagi skjóti eg upp, at tað skal gerast lætt hjá teimum at sleppa úr danska kongaríkinum, at missa sín danska ríkisborgararætt og allar teir fyrimunir og møguleikar, sum hesin ber í sær. Í øðrum lagi skjóti eg upp, at arbeitt verður fram ímóti at gera okkara skattaskipan so smidliga, at til ber hjá teimum, og øllum øðrum loysingarhugaðum, at sleppa undan at eiga lut í ríkisstuðlinum. Tað skal kunna skipast á tann hátt, at skattabyrðurnar hjá teimum verða øktar – helst við einari kombinatión av hægri inn-tøkuskatti, ognarskatti og fullveldisskatti til teir. Um inntøkur til landið spyrjast burturúr hesum, so verða teir pengarnir brúktir til at reka samfelagið fyri, sam-stundis sum ríkisstuðulin kann minkast tilsvarandi. Ein slík skipan hevði tryggjað teimum, at tað eru teir sjálvir – og ikki ríkisstuðulin – sum rinda fyri tær vælferðartæn-astur, sum teir vilja hava.

### »Frælsi«

Óivað hevði tað verið meiri optimalt fyri tykkum, Hanus Vang, um allir aðrir føroyingar hildu sum tit, og vildu gjørt sum tit; men tá tað nú ikki er støðan, er hetta alternativið so ikki frægari enn onki? Tað hevði verið mansligt av tykkum at manifesterað tykkum sum omanfyri nevnt, og sikkurt høvdu tit fingið aðrar føroyingar við eisini. Tit høvdu ikki fingið allar Føroyar í einum háli, men tað gjørdu floksmenninir* jú heldur ikki á sinni. Vit onnur høvdu verið hjartans glað tykkara vegna, tí nú høvdu tit endiliga fingið "frælsi". Kann væl hugsast at fleiri okkara eisini høvdu følt tað sum ein harrans lætta, um tit sluppu tykkum burtur úr ríkinum. So hetta er væl einki at bíða við, Hanus Vang, ella hvat?

Gott nýggjár!

*Floksmenninir úr Hattarvík vóru, sambært søgnini, Hálvdan Úlvsson, Høgni Nev, Rógvi Skel og Sjúrður við Gellingará.

# Føroyingar fáa internetskatt - steðga ørskapinum!

*HUXA finst hvassliga at kunngerðini um, at øll við internetsambandi skulu gjalda kringvarpsgjald*

### Alnetið

Tað gongur ikki ein dagur, uttan at vit lesa og hoyra um eykagjøld, ið verða smoygd niður yvir høvdið á borgaranum. Og nú er landsstýriskvinnan fyri mentamálum, Helena Dam á Neystabø, komin við einum nýggjum fyribrigdi: hvør føroyingur, ið hevur internetsamband, fær eykarokning, bara tí at hann hevur alnet. Tað tykist, sum javnaðarkvinnan roynir at gera tað ómøguliga: at stýra alnetinum. Tað hevur tó eydnast hjá Kim Yong Ill og kinversku stjórnini, men tað er ivasamt, um føroyingar ynskja at fylgja trendinum.

### Útreiðslubumba

Flest ung hava internet, annaðhvørt á teldu ella fartelefon. Hetta merkir í stuttum, at hvør næmingur á miðnámi skal brúka tveir studningar til kringvarpsgjald um árið. Er hetta ikki at leggja stein oman á byrðu, tá ið studningurin lækkaði í fjør? Helenda Dam á Neystabø kundi eins væl sent miðnámsskúlanæmingunum eitt útvarpstól, uttan at tey høvdu biðið um tað, fyri síðani at senda rokningina, tí at næmingarnir kunnu taka í móti signalinum.

### Útisetar

Hvørjar ætlanir hevur Helena Dam á Neystabø við alnetsstýringini? Eru tað bara føroyingar, ið búgva í Føroyum, sum gjalda fyri internetskattin, ella eru tað allir føroyingar í heiminum? Er kunngerðin galdandi í Føroyum og ikki aðrastaðnis, ger hon mismun millum skattaborgaranar í Føroyum og føroyingin í útlegd.

### Uppskot

HUXA er harðliga í móti kunngerðini, tí at hetta er ein eykaskattur. Vit heita tískil á løgtingið um at viðgera málið av nýggjum, tí ístaðin fyri internetskatt, hvat við at taka eitt gjald fyri sendingarnar á netinum?

**Huxa**



Hans Andrias Joensen,
*reiðari*

# Minnir um landasvik

Fyrrverandi formaðurin í Reiðarafelagnum fór í sjónvarpið gamlaárskvøld at siga Føroya fólki, at um Føroyar fáa 9-10% av makrelkvotuni, so hevði tað verið eitt gott úrslit. Hettar er undirgravandi virksemi av allar grovasta slag, tí føroyski fiskimálaráðharrin hevur alment úttalað, at føroyski parturin, í minsta lagi, skal vera nakað, ið líkist 15%. Um hettar fór fram aðrastaðni, hevði ákæra óivað verið reist um landasvik, tí mótpartarnir (hini londini) fylgja væl við, um hvat verður sagt í Føroyum og vilja brúka hettar ímóti okkum.

At sjónvarpsverturin er sonur fyrrverandi stjóran á føroysku Havstovuni, setir eisini aðrar tankar í gongd. Hettar átti somuleiðis at fingið álvarsligar avleiðingar fyri stjórn og programmleiðara í SvF.

Hvørt % er vert á leið 65 milliónir krónur um árið fyri Føroya land, so talan eru um hundraðtals milliónir, sum vit standa til at missa, grundað á hettar undirgravandi virksemið.

Tað er eyðsæð, at fyrrverandi formaðurin í Reiðarafelagnum er boðberi fyri JFK, har hann starvaðist í yvir 50 ár. Hettar er eitt grovt dømi um, at ein ávís fyritøka roynir at fáa eina avtalu ígjøgnum, sum er til fyrimuns fyri hesa fyritøkuna her og nú, men ein ómetaliga vánalig avtala fyri Føroyar land. Tað sum í hesum førinum býr aftanfyri er, at JFK nýtir gott av, at Føroyar hava givið russum 25.000 tons av makreli í umbýti við tosk fyri 2011. Um tað eydnast JFK at bera so í bandi, at Føroyar fáa eina skjóta og vánaliga makrelavtalu, so fáa teirra skip loyvi at fiska tosk í norskum sjógvi. Taparin verður Føroya land við einum árligum missi á fleiri hundrað milliónir krónur.

Undir samráðingum átti tað at verið bannað, at einoghvør kann úttala seg alment um samráðingar-viðurskiftir, og skaðandi úttalilsir áttu at verið hart straffað, eitt nú við tikið kvoturnar frá reiðarínum, sum stendur aftan fyri hettar undirgravandi virksemið.

**Við Nýggjárskvøðu**